# Ein væleydnað Íslandsferð

## Sólvit Simonsen hugleiðir um íslandsferð hjá kunningarstovum í marsmánaði

ÍSLANDSFERÐ

*Sólvit Simonsen*
*Fyrri partur*

Aftan á at hava tosað við Petur M. Petersen á kunningarstovuni í Fuglafirði, heitti hann á meg, um at skriva eina frágreiðing frá túrinum í Íslandi, og ætli eg at royna tað, hóast nú er tíð fráliðin. Orsøkin til at eg var við, var tann, at leiðarin á kunningarstovuni her á Sandi bleiv sjúk, og stóð tað mær í boði at fara; eg ivaðist ikki, men fór avstað.

Vit fóru úr Vágum t. 1/3-04 við flogfari og høvdu sera góðan túr yvir til Íslands, og blíðskapurin umborð á flogfarinum var góður, sum hann altíð er í føroyska flogfarinum.

Vit komu til Reykjavíkar og vóru móttikin av tí brosandi Dávídi Samuelssyni, sum er hálvur føroyingur. Hann hevur búð eina tíð í Føroyum og tosaði føroyskt. Hann bleiv ferðaleiðari hjá okkum allan túrin, so har vóru vit sera heppin.

Fyrsta vit gjørdu, var at fara inn á Reykjarvíkar Information. Okkum var boðið upp á ovasta loft í eitt fitt rúm, har tey bjóðaðu okkum roykt ross, royktan lomviga og sterkan íslendskan ost.

Síðani fóru vit í Icelantic Tourist Board. Har bleiv frágreiðing givin á enskum tungumáli, og tað var veikleikin hjá mær fyri túrin, at tá ið tosað verður ov týtt, fái eg onki við av tí, ið sagt verður. Men blíðskapur var somuleiðis á ovasta lofti við kaffi og køkum.

Síðani varð farið í Alþingshúsið. Vit stóðu á »Svølum Alþingis« (svalanum ella vit kenna kanska betur orðið balkon) sum teir rópa tað á Alþingi og hugdu, har ein nobel dama talaði fyri tómum sali; men tað bleiv sagt okkum, at alt bleiv tosað í sjónvarpi, so at alþingslimir kundu sita heima og lurta og soleiðis svara upp á tiltalu.

Kl.18 fóru vit við flogfari á Egilsstaðir, vit komu leiðina fram í øllum góðum, og vóru á sama hátt sera væl móttikin á Egilsstøðum. Okkum var boðið inn á tað nýggja hotellið, sum tey vóru sera stolt av, tað var dama í góðum árum, sum átti og hevði raksturin av hotellinum, og arbeiddi sín stóra part sjálv.Við gleði segði hon okkum, at hetta var fínasta hotelli í Íslandi.

Av Egilsstøðum gekk leiðin til Seyðisfjarðar. Har var móttøkan somuleiðis sera góð. Har kann eg nevna, at sonur Hans í Andarisa, hesin Hans er heimasandsmaður, sum giftur er og býr á Seyðisfirði, var og tók ímóti okkum. Hann er borgarstjóri á Seyðisfirði. Á Seyðisfirði hava seyðfirðingar keypt hotel, eini stór eldri hús, sum tey brúka til matstovu og nøkur seingjapláss, og so høvdu tey tvey hús afturat, sum tey brúktu til seingjapláss, tá ið tørvur var á tí. Teir byrjaðu við einum húsi, settu tey so í pant og stovnaðu síðan partafelag. Eitt ungt par, sum hevði verið í Danmørk og fingið sær útbúgving, dreiv hotellið. Har á hotellinum vóru vit biðin um ein og ein at reisa okkum úr sessi og siga hvaðani vit vóru frá og sjálvandi navngeva okkum.



*Aftara rað frá vinstru: Heidi Kilgour, Suðuroyar Kunningarstova, Vági, Per Hansen, Ferðaráð Føroya, Póla Strøm, Suðuroyar Kunningarstova, Tvøroyri, Petur Martin Petersen, Eysturoyar Kunningarsotva, Fuglafirði, John Eysturoy, Ferðaráð Føroya, Christian Olsen, Norðoya Kunningarstova, Sólvit Simonsen, Sandoyar Kunningarstova og Davíð Samúelsson, Kunningarstjóri í Hveragerði, ferðaleiðari*
*Fremra rað frá vinstru: Anna Sofía Nordendahl, Kunningarstovan í Vágum, Rannvá Troest, Eysturoyar Kunningarstova, Runavík, Anna Maria Ellingsgaard, Kunningarstovan í Havn*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Týsdagur t. 2/3'04

Petur M. Petersen og eg sjálvur vóru einastu menn, sum svóðu í húsinum, har ið matstovan var. Vit tørnaðu út kl. 07:30, tá komu eisini øll hini, sum høvdu sovið í einum húsi úti í býnum. Tey lótu øll sera væl at, og høvdu havt eina góða náttarhvílu. Tá var Hans í Andarisa komin at heilsa upp á okkum. Sami blíðskapur, sum ein minnist, sum yngri í Andarisa. Hann beyð mær inn á gólvið heima hjá sær, men eg vildi ikki fara frá ferðafeløgunum. Síðani fóru vit at hyggja at einari gamlari smiðju, sum teir høvdu varðveitt, alt tað gamla var varðveitt og hildið við líka, og eldurin brendi á essuni. Hendan smiðjan hevði verið arbeiðsplássið hjá Hansi í eldri árum, aftan á at hann gavst sum sjómaður. Hans er í dag 84 ára gamal.

Haðani fóru vit inn í Føroyahúsið, teir kalla. Terminalur spildur nýggjur sum teir hava bygt til Norrönu. Sera fínur, væl gjørdur sum móttøku- og fráfaringarpláss, og var hann 500 fermetrar til støddar.

Harnæst varð tað maður, sum æt Jónas Halgrímsson, hann var nevndarlimur í Smyril Line, saman við havnastjóranum, sum beyð okkum inn á kunningarstovuna og havnarskrivstovuna. Aftan á at hava víst okkum vælvirkandi skrivstovur, var okkum aftur boðið upp á eitt blíðskapskamar á loftinum, har bleiv boðið okkum turran fisk, hávkarl og ymisk sløg av brennivíni. Blíðskapur um ein háls. Tá ið vit nærkaðust skrivstovuni, veittraði tað føroyska flaggið og beyð okkum vælkomin. Slíkt rørdi hjarta.

Vit fóru tá aftur á Egilsstaðir, har vit ótu døgverða á einum gomlum bóndagarði, sum var umbygdur til hotell. Har var Petur M úr Fuglafirði ógvuliga fegin um at verða uppvartaður av somu familju, sum abbi hansara hevði samskift við fyri eitthundrað árum síðani, tá ið hann róði út í Íslandi.

Síðani varð farið avstað við bussi suðureftir. Við steðgaðu á Reyðafirði. Har fóru vit á sjósavn. Har var nógv áhugavert at síggja, t. d. hópur av føroyskum tilfari. Har var eitt model av sluppuni Mariu, sum Niels Midjord hevði gjørt. Hetta modellið steðgaði eg við, tí eg minntist aftur á tíðina, tá ið »Maria« mestsum koyrdi heima á Sandi. Bjarni Sandoy, sáli, førdi hana, og hon var manna við sandingum.

Vit vóru eisini inni í einum gomlum handli, sum teir høvdu varðveitt, og var hetta sera áhugavert. Inni á kunningarstovuni, fingu vit ymisk sløg av turrum fiski at smakka. Smáir bitar í posa, minnir um smáar kipsposar. Deiligt at hava undir tonnini. Hetta varð framleitt har á staðnum.

Harnæst fóru vit á Egilsstaðir, har vit koyrdu runt, tá gekk tíðin undan; men álíkavæl góðu vit okkum góða tíð at hyggja eftir byrgingum, teir høvdu gjørt ímóti skalvalopi. Tá var ódnarveður, stormur og regn. Vit máttu ganga niðan, men vit strembaðu ímóti veðrinum. Tað var stórverk ið teir har høvðu gjørt.

Síðani koyrdu vit aftur í móti Egilsstøðum, har vit skuldu í flogfarið, men flogfarið fleyg ikki vegna ódnarveðrið, ið var. Eisini bleiv sagt, at toran hevði sligið niður í flogfarið, so at tað mátti eftirkannast. Eg gloymdi at skriva um flogferðina til Egilsstaðir, at flogskiparin segði í hátalaranum, at ísur var lagdur á propellurnar, so hann mátti koyra meira á motorin. Tað helt eg vera nervapirrandi…

Tá ið vit komu á Egilsstaðir og ikki sluppu í flogfarið, helt Dávíd, at vit skuldu fara inn á ein rossagarð. Vit vóru varug við, at Dávíd og vertsfólkini vóru serliga væl og fingu tá at vita, at hettar var systir hansara Ragnheiður Samuelsdóttir, sum átti garðin saman við manninum Stéfani Sveinssyni. Rossini brúktu tey til útleigan og til sølu. Har borðreiddu tey við góðari heitari súpan, sum smakkaði sera væl í óveðrinum. Í hesum húsi tóku tey ímóti ferðandi. Tey høvdu gjørt kømur í kjallaranum og høvdu stóran køk, sum eisini kundi borðreiðast í, sum eini vanlig hús í Føroyum. Eg spurdi um tey høvdu gistingarloyvi frá myndugleikunum, og tað var beinanvegin, so lá tað skrivliga loyvið hjá teimum á borðinum, og søgdu tey mær, at einasta myndugleikarnir kannaðu gjølla var, hvussu umstøðurnar vóru til at sova. Eg hugsaði við mær, at tað bleiv meira strammað at í Føroyum.

Tá ið tørnast skuldi inn, beyð Dávíd Peturi og mær at sova á nýggja hotelli, við tað at vit høvdu sovið á einum eldri gistingarhúsi á Seyðisfirði. Petur M vildi heldur sleppa at gista á tí eldra, har abbi hansara hevði búleikast á yngi árum, so tað blivu John Eysturoy, Kristian Olsen og eg sjálvur, sum gistu á tí nýggja hotellinum.

*Sólvit Simonsen av Sandi, og Hans í Andarisa, sum eisini er heiman av Sandi, men býr á Seyðisfirði*
*Mynd: Edvard Joensen*





*Av Egilsstøðum gekk leiðing hjá føroyska ferðalagnum til Seyðisfjarðar. Har var móttøkan sera góð _ og sonur Hans í andarisa, sum var heimansandsmaður, giftur og býr á Seyðisfirði, tók ímóti føroyingunum. Hann er borgarstjóri á Seyðisfirði*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Íblástur valdast

## Framsýningarstøðið, sum hevur verið sera høgt í Listasavnið Føroya undir leiðslu Bárður Jákupssons, er munandi lækkað í ár, og tað er at vóna, at orsøkin er at finna í leiðaraskiftinum, og at nýggi listarligi leiðari Listasavnsins, Inge Smærup Sørensen, ið byrjaði 1. august, fer at venda skeivu gongdini

*Kinna Poulsen*

Onkur hevur møguliga undrast yvir hálvkvøddar vísur um listamannin Øssur Mohr og hansara støðu í føroyska listaumhvørvinum. M. a. nevndi Helgi Fossádal, nevndarlimur í Listasavni Føroya, í Degi og Viku, at Øssur Mohr ikki var viðurkendur millum viðurkendu listafólkini her heima. Samstundis lat altso serframsýning upp í Listaskálanum við myndum hjá hesum sama Øssuri Mohr. At hava serframsýning í okkara tjóðlistasavni er eyðvitað tann størsta viðurkenningin, eitt føroyskt listafólk kann fáa í Føroyum, ikki minst tá hon verður knýtt at Listastevnuni. Men hvussu man hetta hanga saman? Er Øssur Mohr viðurkendur ella ikki, og hvørjar eru orsøkirnar til omanfyri lýstu tvørstøðu?



### Vantandi sjálvstøði

Hvørt eitt listafólk er viðurkent ella ikki valdast kanska, hvønn tú spyrt. Til dømis hevur Øssur Mohr í fleiri ár verið fastur fúsur bæði á Ólavsøkuframsýningum og á Várframsýningum, eins og hann hevur havt nógvar serframsýningar bæði her og niðri. Hetta kundi jú týtt upp á eina lutfalsliga viðurkenning. Men so er tað teir ómøguligu ummælararnir. T. d. hevur undirritaða í fleiri ummælum gramt seg um vantandi sjálvstøði í verkum Øssurs Mohr, og tað hava aðrir ummælarar eisini gjørt, eitt nú Malan Marnersdóttir. Undirritaða er ei heldur einsamøll um at leggja til merkis, at Øssur Mohr í stóran mun hevur lagt seg eftir at mála sum Zacharias Heinesen, ella í øllum førum soleiðis, sum Zacharias málaði fyrr (frá seinast í 80´unum og gjøgnum 90´ini). Myndevnið er tann av yvirfegnu ummælarunum í Kunstavisen sera vældámda klisjein, bygdin við havið, tey elskuligu litríku húsini í náttúrunar velduga mátti. At tað hevur eydnast Øssuri hampiliga væl at ogna sær stílin, kundi niðanfyrilýsta uppliving týtt uppá.

### Typiskt Heinesen

Ein gerandisdag beint áðrenn Ólavsøku einaferð í 90´unum var mær fyri ein døguraðtíma at vera stødd einsamøll í stóra framsýningarsalinum í Listaskálanum. Eg var í nevndini, ið hetta árið skuldi velja út og seta Ólavsøkuframsýningina saman. Hetta er ongantíð nøkur løtt uppgáva, men altíð ein spennandi avbjóðing, serliga tí tú veitst, at hetta er tann føroyska listaframsýningin, ið verður sædd av flestu føroyingum. Eg gekk tískil spent og hugdi at innkomnu verkunum, ið vóru stillaði kring salin, tá hurðin brádliga brast upp og trý fólk trinu so andbrá inn í salin. Á odda gekk pelsklædd kona, og hon stýrdi beinleiðis móti einum størri málningi. Og áðrenn undirritaða yvirhøvur var komin so mikið langt sum til at samla bilsnu høkuna upp aftur, fór pelsakonan við kennarabragdi í holtur við langrøkjuta einatalu um Zacharias Heinesen:

»Ja, det ER jo Zacharias, - et vidunderligt værk. Det er jo et typisk Heinesen-billede, der ligesom indkapsler naturen på Færøerne PRÆCIS sådan som man kender det med regn og tåge og så det der storslåede, som er så svært at sætte ord på... Og farverne! Det er KUN Heinesen, der kan få de farver frem... - De færøske malere er vidunderlige, men Heinesen er jo milevidt foran, ikke sandt?«.

Hetta seinasta var vent til tann fullkomiliga málleysa listafrøðingin, sum nú noyddist at manna seg upp og greiða frá, at tað ikki var Zacharias Heinesen, ið málað hevði myndina, men ein yngri føroyskur listamaður, ið æt Øssur Mohr. Konan var bæði forharmað og fornermað, og tað batti einki, hvussu so eg trávissaði hana um listarligt gløggskygni og ta eyðsýndu líkheitina millum myndirnar hjá teimum báðum listamonnunum. Og tá eg fegin greiddi henni frá tí greiða fyrimuninum, at myndin, henni dámdi so væl bert kostaði helmingin av, hvat ein mynd hjá Zachariasi í somu stødd hevði kostað, gjørdist henni tað heila so ovboðið, at hon fór.

### Listasnobbarí

Listasnobbarí er eitt ógvuliga vanligt og lutfalsliga óskaðiligt fyribrigdi, ið fá kunnu siga seg heilt frí fyri. Listasnobbarí trívist eins væl millum føroyingar, sum tað tykist gera niðri og í restini av heiminum, í øllum førum tí partinum, har fólk eiga ov mikið av pengum. Tað skal eitast at vera fínt at hava áhuga og skil fyri list, og tí er best at um ikki annað lata sum um og mutla: »Áhugavert« ella »Hann leitar...« og nikka samvitandi til síðumannin meðan tú granskar listaverkið. Men listaáhugi kann jú í øllum formum føra til listakeyp, og tí er listasnobbaríið góðtikin partur av listaumhvørvinum. Eg skal ikki duga at siga, um omanfyrinevnda kvinna lat sum um, ella um hon veruliga var myndlistaáhugað. Tað er fyri so vítt heldur ikki týdningarmikið. Tilburðurin í Listaskálanum er bert nevndur sum dømi um, at tað ikki bert eru ummælarar, ið síggja líkheit millum myndirnar hjá Øssuri Mohr og Zachariasi Heinesen, og tað snýr seg ikki bert um val av myndevni. Eisini málihátturin hjá Øssuri minnir serstakliga nógv um tann hjá Zachariasi heilt frá undirmálingini í sterkum grundlitum til viðgerðina av myndevninum, ið verður skipað í fýrkantaðar flatar.

Tað eru góð 50 ár síðani, Zacharias fór at framsýna sínar myndir, hann hevði tá gingið á listaakademinum í Íslandi og Keypmannahavn. Sum so mong onnur gjørdi hann sína fyrstu framsýningarroynd í Ólavsøkuframsýningini. Øll hesi árini hevur hann spakuliga arbeitt seg fram til ein egnan impressionistiskan stíl. Hann hevur málað framúrskarandi myndir, har hann hevur megnað at fanga ljósið og vætuna í tí føroyska landslagnum. Í hesum myndunum er tað sum allur myndflatin skyggir og gerst glitrandi. Í myndunum hjá Øssuri tykist tað snúgva seg um júst tað sama, um ljósglottar, og hvussu teir upplivast í tí váta, føroyska veðurlagnum.

### Íblástur valdast?

Men hevur Zacharias patent upp á omanfyrinevnda stíl? Er júst hasin mátin at mála bygdina við havið ikki at kalla ein listarligur skúli í Føroyum? Er íblástur ikki fult út legalur? Er Zacharias ikki sjálvur ávirkaður av eitt nú franska listamanninum Paul Cézanne? Stendur eitt listafólk ikki altíð á herðunum á ættarliðunum frammanundan, og hvat við øllum teimum mongu føroysku listafólkunum, ið eru ávirkað av Mikinesi?

Jú, sjálvandi er íblástur góður, men íblástur valdast. Spurningurin er, um vit yvirhøvur kunnu seta originalitetskrav longur til listina, eftir at t. d. amerikanski popplistamaðurin Andy Warhol fór í gongd við at hópframleiða listaverk. Fyri at leggja dent á tað óupprunaliga og hópframleidda árinið við hansara verkum, nevndi hann sína starvsstovu »The Factory«. Tað er nú sera ivingarsamt, at tað er tann vegin, Øssur Mohr ætlar. Í blaðsamrøðu í sambandi við framsýningina í Listaskálanum greiðir Øssur Mohr frá, hvussu føroyska náttúran, serliga vakra náttúran kring heimbygdina Fuglafjørð, hagani hann er, ávirkar hann sum listamann. Øssur Mohr er ivaleyst dámligur maður, hann tykist eyðmjúkur og sigur tað vera stóran heiður at sleppa at sýna fram í Listaskálanum í sambandi við Listastevnu Føroya.

### Framsýningarstøðið lækkað

Tað er eisini væl skiljandi, at Øssur Mohr er fegin. Hansara náttúruupplivingar eru so mikið vælumtóktar, at hann fyri 4 árum síðani kundi byrja at mála fulla tíð og eftir bert 4 ár innan professionella myndlist, hanga verkini hjá honum í Listaskálanum. Tað er væl megnað av Øssuri, men ikki av Listaskálanum, sum í løtuni minnir meira um eitt gallarí enn um eitt tjóðlistasavn soleiðis at skilja, at virksemið í størri mun tykist ganga út upp á sølu enn góðsku. Og argumentið »gev fólkinum tað, fólkið vil hava« er yvirhøvur ikki nóg gott til eitt tjóðlistasavn. Ein serframsýning er eyðvitað tað sama sum eitt alment góðskustempul, ið inniber eitt tekin til fólkið um, at verkini hjá viðkomandi listafólki er góðskuvøra. Tí skal eitt tjóðlistasavn leggja seg eftir at sýna fram tað allarbesta. Framsýningarstøðið, sum hevur verið sera høgt í Listasavnið Føroya undir leiðslu Bárður Jákupssons, er munandi lækkað í ár, og tað er at vóna, at orsøkin er at finna í leiðaraskiftinum, og at nýggi listarligi leiðari Listasavnsins, Inge Smærup Sørensen, ið byrjaði 1. august, fer at venda skeivu gongdini.

Framsýningin hjá Øssuri Mohr er opin til 12. september. Upplýsingar um framsýningina eru á www.listastevnan.com og www.oessur.dk

